# Ein sneis við góðum upplivingum

**Eitt serligt 20 ára skeið er endað í føroyskum fótbólti. Harley Bertholdsen sum hevur spælt við besta liðnum hjá KÍ, árini 1988-2008, fer ikki at tørna út fyri besta liðið hjá KÍ aftur**



Ein ungur Harley Bertholdsen í nærdysti

## Ítróttarprofilur



**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo
Myndaútvegari: John William Joensen

Skrivarin hevur leitað sær norður til hølini hjá Sosialinum og Rás2 í Nólsoyar Pálsgøtu í Klaksvík. Stutt aftaná eg havi sett meg inn í skrivstovuna, trínur ein høgur og rankur maður innar í hølini. Ikki sæst á honum, at hann skjótt fer um tey 40 árini, og at hann hevur verið partur av besta liðnum hjá KÍ í samfull 20 ár. Maðurin er blíður og fyrikomandi sum altíð. Dygdir sum røkka langt í dagliga lívinum, og eisini tá ein skal selja dygdargóða máling. Fyrsti spurningurin til Harley Bertholdsen, er sjálvsagt hví hann hevur valt at gevast á besta liðnum hjá KÍ? Harley er ivaleysur í svari sínum: - Nú er man komin upp í árini, tað er ikki tí skaðar arga, men eg havi bara valt at gevast. Aldurin spælir eisini inn. Harley fer skjótt um tey 40, og sum hann sigur við egnum orðum: - Tað er sjálvsagt lættari at siga, at ein er í 30-unum, enn at siga, at ein er 40 ár. Harley viðgongur, at tað kridlar eitt sindur í honum, tá hann koyrir framvið Injector Arena á Djúpumýru: - Talan er um eitt gott umhvørvið, og ein treivst væl í hasum umhvørvinum. Onkuntíð fer ein at ynska seg aftur, serliga summarkvøldini. Barlastin, sum Harley hevur fingið, sum ítróttarmaður hevur eisini hjálpt handilsmanninum Harley: - Ein lærir, at ein skal ongantíð geva upp. Harley hevur bygt sær eitt stórt kontaktnett, við at hava spælt í bestu fótbóltsdeildini í 20 ár: - Eg vil siga, at ein hevur fingið nógvar vinir ígjøgnum fótbóltin. Tá fólk koma inn í handilin hjá Harley, sum eitur "Norðoya Litbúð" er tað ofta so, at fólk hava hug at beina prátið inn á fótbólt: - Eg royni at gera tað handilsliga liðugt fyrst, áðrenn prátið kemur inn á fótbóltin. Men Harley undirstrikar, at hann hevur havt nógv góð fótbóltsprát inni í handlinum.

### Byrjaði 8 ára gamal

Harley var 8 ára gamal, tá hann byrjaði at spæla pinkulingafótbólt, sum tað var nevnt í 1970-unum. Tá í tíðini byrjaðu kappingarnar ikki fyrr enn í piltadeildini, tá ein var 10 ára gamal. Árgangurin hjá Harley er 1969. Sami árgangur sum legendan Kurt Mørkerø, og tann eisini væl kendi málverjin, John William Joensen, sum hevur verið so beinasamur at læna okkum myndir til hesa greinina. Áhugin í skúlaflokkinum hjá Harley fyri fótbólti var stórur, og var tað eisini ein avgerandi faktorur fyri, at Harley sjálvur fekk so stóran áhuga fyri fótbólti. Tá í tíðini vóru eisini nógv býlingalið í Klaksvík, og høvdu Harley og hinir dreingirnir úti á Bumshamri eisini sítt býlingalið. Teir vóru eisini nógv í Víkunum og spældu fótbólt. Tá var ikki so nógv gjørt við innandura fótbóltin, tá Harley var smádrongur, men hendinga innandura kappingar vóru, sum Harley tók lut í. Slíkt var ikki so væl skipað, sum í dag.

### Tríggir KÍ-brøður

Yngru brøðurnir hjá Harley, Eddie og David hava eisini tørnað út fyri KÍ: - Vit vóru stuðlaðir til at spæla fótbólt, og foreldrini vístu okkum altíð áhuga, og tey fylgdu væl við okkum upp gjøgnum fótbóltsdeildirnar. Foreldrini, Malena og serliga Kristian hava verið at síggja millum stuðlarnar hjá KÍ, og hevur Kristian eisini ferðast nógv til útidystirnar hjá KÍ. Harley heldur, at Eddie og David góvust ov tíðliga at spæla fótbólt á høgum støði. Miðlingurin, Eddie gavst at spæla fótbólt, tá hann var mitt í 20-árunum. David hevur verið sjómaður, og hevur tí ongantíð gjørt so nógv við fótbóltin, sum evnini hava rokkið til. Millum túrarnar hjá Skálaberg, hevur David tó gjørt vart við seg á 2. liði hjá KÍ. David slapp at royna seg á 1. liði í einum ólavsøkudysti. Um miðlingin sigur KÍ-veteranurin: - Eddie var kanska tann tekniskt besti av okkum trimum, og tann besti spælarin av okkum. Harley er ivaleysur í hesi metingini.

### Góður árgangur

Fyrstu ferð Harley gjørdist Føroyameistari var í smádreingjadeildini í 1982. Teir møttu HB í finaluni. Aftaná tveir dystir og umdyst var framvegis javnt, og farast mátti til brotssparkskapping, sum Harley og liðfelagarnir vunnu aftaná, at liðini høvdu tikið 9 brotsspørk í part. Millum mótstøðumennirnar í HB, var verjulegendan, Jan Dam, Bjarni Mikkelsen og Ivan Weihe, sum var eitt stórt talent hjá HB. Harley vann aftur FM við smádreingjaliðnum hjá KÍ í 1983. Tað gjørdist ikki so dramatiskt hetta árið. Harley og liðfelagarnir vunnu kappingina við einari